BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað starv sum einalærari í Haraldssunds skúla

Tíðaravmarkað starv til komandi tvey skúlaárini 2023-2025 sum einalærari í Haraldssunds skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2023. Í skúlanum verða tað komandi skúlaár væntandi 5 næmingar.

**Um starvið**

Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans. Hann undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans.

Einalærarin skal fremja gott samstarv millum skúla og heim og virka fyri, at næmingarnir trívast og fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing. Eitt samstarv er við Skúlan á Skúlatrøð, har næmingarnir eru til undirvísing ein dag um vikuna og einalærarin er við.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava

- Læraraútbúgving  og starvsroyndir í fólkaskúlanum.
- Førleika at taka neyðugar avgerðir, at virka fyri trivnaði og einum mennandi læruumhvørvi.
- Førleika at orða seg á góðum føroyskum máli

**Setanarviðurskifti**

Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Haraldssunds skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av lærarauprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi **4. juni 2023**.

**Umsóknin verður stílað til:**

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110  Tórshavn
ella við t-posti**: bumr@bumr.fo**

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, eru vælkomin at ringja til Høgna Warberg, fulltrúa, tlf. 555054.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, gransking, barnavernd, barnaheilsu og dagstovnaøkið. Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo*